# Pisurøða 2024

## Emma Nagurset Langgaard, N21y, vegna næmingarnar

Góðu foreldur, avvarandi, lærarar, starvsfólk og ikki minst – pisur.

Tað er mær ein stórur heiður at halda fráfaringarrøðuna vegna næmingarnar á Kambsdali 2024.

Pisufundur er á hvørjum ári, og vónandi fara vit at fáa hægri útbúgvingar og upplivingar seinni í lívinum. Men – í skrivandi stund, fyri okkum pisum, er hetta stórt. Allarhelst tað største, ið vit higartil hava upplivað.

Og kæru pisur – vit hava klárað tað. Vit eru endiliga blivin studentar.

Okkara tíð á Kambsdali byrjaði við korona. Fyrsta árið var rokaligt við einari blanding av vanligari undirvísing og online undirvísing. Tað sum var ringast av øllum, var, at veitslurnar blivu avlýstar. Vit høvdu tørv á at sosialisera, at hyggja eftir mótssætta kyninum, ella tí sama, at knýta nýggj vinabond, men alt tað var tikið frá okkum. Tó – skal eg vera púra erlig, so var korona ikki bara ringt. At liggja í songini, durva eitt sindur, ímeðan Christian meylaði um Maple var ikki heilt galið :D

Hyggja vit aftur á tíðina á Kambsdali, so ímyndi eg mær, at tey flestu hava havt løtur, har man hevur ivast, um avgerðin at fara á Miðnám, var røtt. Úrslitini av ársroyndum og próvtøkum var kanska lægri, enn vit sjálvi høvdu væntað. Planurin virkaði ikki, sum hann skuldi, ella nervøsiteturin tók yvir.

Samstundis kempaðu tey flestu við øðrum trýsti. M.a, ítrótti á høgum støði, foreldrum, sum ikki hildu, at skúlin fekk nóg høga raðfesting - og ikki at gloyma, teir pengarnir, sum vit máttu tjena, um vit skuldu hava ráð at keypa í kantinuni.

Tað er ivaleyst, sum Christian plagar at minna okkum á:

*"Koblið tykkara brainpower on, og gerið tykkara besta. Men minnist til, at ein karakterur sigur ikki, hvørja virðing tit hava sum persónar"*

Men, sæð í bakspeglið, so gongur alt upp í eina hægri eind. Trýstið og frustratiónirnar vóru við til at fyrireika okkum uppá framtíðina. Eina framtíð, har vit ikki stýra øllum, men mugu tillaga okkum til umstøðurnar, hóast tað kennist frustrerandi og órímiligt.

Hyggja vit burtur frá fakliga trýstinum, hava vit havt nógvar góðar upplivingar á Kambsdali. Sum næmingar hava vit dummað okkum inn í millum, men tað gera lærararnir eisini.

Eg kom at hugsa um, tá ið vit vóru á námsferð, og skuldu ígjøgnum security á flogvøllum í Napoli. Beint tá ið nakrir hermenn gingu forbí, rópti Christian, rektarin, til okkum "goymið tykkara revolvara og bumbur", og tað gekk ikki leingi, so hevði Lau skeldað hann bæði út og inn. Haldið Christian hevði gloymt at 'revolvara og bumba' kann skiljast á øðrum málum.

Tá ið eg hyggi út ímillum tykkum, síggi eg fólk, sum eg havi kent í yvir 14 ár. Fólk sum eg eri vaksin frá, og fólk sum eru blivin míni tættastu vinfólk. Tá ið eg hyggi longur út í fjøldina, síggi eg fantastiskar lærarar, sum hava havt størri ávirkan á okkum, enn tey geva sær fær um. Eg síggi foreldur, sum ikki bert hava stuðlað teirra egna barni, men okkum øllum. Eg síggi eina fjøld av fólki, ið hava havt ein stóran leiklut í, at vit í dag standa her, sum floygdar pisur á Gøtusandi.

Hóast hendan kenslan er fantastisk, er løtan tó ikki bara gleðilig, tí at hetta er eisini løtan, har vit fara hvør til sítt.

So kæru pisur, takið eina løtu, og hyggið rundanum tykkum.

Hygg at tykkara vinfólkum, sum tit hava havt blokkar saman við, sum tit hava flent saman við, grátið saman við, og sum tit hava skapað minnir fyri lívið saman við. Njótið tær seinastu løturnar saman, áðrenn vit veruliga gerast vaksin.

Dagurin í dag er ikki bert ein endi, men eisini ein nýggj byrjan. Sum Martin Joensen so vakurt hevur yrkt:

*"Men, tú eigur dagin og ljósið*
*tú eigur náttina við*
*tú eigur stjørnurnar allar*
*tú eigur rættin til frið."*

Næsti kapitul bíðar eftir at verða skrivaður, so lat okkum taka hann við opnum hjørtum og opnum sinni, vera djørv og tora at droyma stórt, og lat okkum minnast til at

*"Tann, ið onki vágar, onki vinnur"*

1000 takk til tykkum øll, ið hava gjørt hesi 3 árini heilt fantastisk og ógloymandi. Eg gleði meg til næsta stigið í okkara lívi og gleðist um góð minnir og lívslong vinabond.

Takk fyri

Emma Nagurset Langgaard, N21y